# VIÐMERKINGAR

SAMBAND
EIRIKUR LINDENSKOV
EIRIKUR@SOSIALURIN.FO
TLF 341800

## Orðaskifti í tøkum tíma

Tað er synd at siga, at føroyskir myndugleikar vóru skjótir at reagera, tá fíggjarliga illveðrið brast á í USA. Vit uggaðu okkum við, at landið var skuldafrítt, oljuprísirinir á veg niðureftir. Búskapurin var í hondunum á marknaðarkreftunum. Smyril Line var bert ein keðilig parentes, undantakið, sum skuldi prógva, at her skuldi ikki loftast. Um hetta grundsjónarmið tóktist í Føroyum vera breið politisk semja. Hetta alt, meðan stjórnir um allan heim loftaðu frá hond. Banka- og fíggjarkerkervi, skipasmiðjuídnaður, bilaídnaður, byggivinna og nógvar aðrar vinnur vórðu, um enn við ringum tannabiti, bjargaðar við almennum peningi. ES eggjaði sínum limalondum til at taka lagnu Europa úr hondunum á teimum áður so hálovaðu marknaðarkreftunum. Grundgevingin var sum heild tann sama: samfelagið toldi ikki, at alt vinnulívið fóru í skeljar við hóparbeiðsloysi í kjalarvørri. Ein slíkur endi fór at kosta ov mikið politiskt, sosialt, vinnuliga og menniskjansliga.

Seinastu tíðina er komið alt meira fram í ljós, at eisini hjá okkum eru fíggjarlig og búskaparlig ófrættatekin á luftini. Fiskivinnan er í álvarsomum trupulleikum, byggivinnan hevur mist ferðina, og peningastovnarnir eru vorðnir varnir. Vinnulív og privatfólk hava torført við at finna fígging, ALS brynjar seg – alt krepputekin. Hesa tíðina hava okkara politikkarar sum so mangan klandrast um stórt og smátt. Føroyar hava hetta seinasta hálva árið mint um eitt húski, sum klandrast um, hvørjum liti, ið húsini nú skulu málast við, alt meðan tað er við at koma eldur í húsini. Men í síðstu viku komu so langt um leingi løgmaður og aðrir á vøllin við útmeldingum, sum skuldu vissa okkum um, at landsstýrið er við at brynja seg til teir fíggjarligu og búskaparligu trupulleikar, ið alheims fíggjarkreppan kann elva til her hjá okkum.

Nú tykist eisini tíbetur av álvara at koma gongd á almenna orðaskiftið í Føroyum um alheimskreppuna. Í annaðkvøld skipar Tjóðveldi fyri áhugaverdum tjakfundi í Miðlahúsinum um, hvussu vit handfara fíggjar- og búskaparligu framtíðina. Fyriskiparin ger vart við, at tekin eru um, at vindarnir, sum blása í verøld, eru farnir at gera um seg á okkara leiðum. Fíggjarstovnarnir hava saðlað um frá eini offensivari til eina defensiva strategi, stórir partar av høvuðsvinnuni eru í svárari neyð og hetta ávirkar nú almennu kassarnar í ólukkumáta. Tjóðveldi ger vart við, at stundin er ikki til partapolitiskt skotgravastríð. Stundin er til at gera status, og at royna at finna frægastu farleiðina ígjøgnum ein væl lakari búskap, í ringasta føri eina kreppu, sum nú er við at taka seg upp.

Vit kunnu nú endiliga staðfesta, at kreppan um síður verður tikin í størsta álvara. Allir flokkar eiga tí at arbeiða saman um at finna skilabestu og virknastu loysnir, soleiðis at vit sleppa undan tí vanlagnu, sum longu hevur rakt fleiri smærri og størri lond í Europa. Vónandi kann ætlaði fundurin eggja flokkunum til samstarv um hetta álvarsmál.

**Sosialurin**

## Føroyingar mugu ganga biddaragongd

ANGELIQUE SIMONSEN

Eg eri blivin bæði ovfarin og bilsin av tí viðgerini, ella mangul uppá sama, eg havi fingið frá almannastovuni í Føroyum. Eg visti ikki tað var so illani statt.

Eg flutti til Føroya við børnum mínum fyri góðum ári síðan, eftir hjúnararskilna. Eg søkti almannastovuna um hjálp til at fáa ting míni heim. Hettar fekk eg noktað. Eg mátti so sjálv royna at skrava saman til at fáa tað mesta í lagi. Vegna varandi sjúku eri eg ikki arbeiðsført og fái tíðanverri ikki skaffa mær meiri pening ígjøgnum arbeiði ella annað tá tørvur er á hesum.

Eg havi síðan mars mánaði biðið Almannastovuna um eina dýnu og eina song til dóttrina, sum er 9 ár. Hon liggur og svevur í seingini saman við systur síni upp á 5 ár. Hettar er jú ikki haldbart í longdini, tí lítla heldur tað stóru vakna osf. Eisini deila tær báðar somu dýnu, tí Almannastovan ikki vil játta okkum eina dýnu.

Vit hava 400 krónur um liva fyri, tá útreiðslurnar eru goldnar. Og so koma barnapengar afturat, so tað vera 2400 krónur at liva fyri um mánaðin.

Almannastovan biður okkum bara um at flyta, tá eg heiti á teir um hjálp. Eg havi eisini biðið um hjálp til vetrarstilvar og jakkar. Men hettar fái eg bara at vita at eg skal avhalda av tí, vit hava at liva fyri.

Tað sum undrar meg stórligani í hesum er, at teir jú væl vita, at teir hava møguleika fyri at hjálpa. Hettar stendur jú í lógini. Men teir nokta at fylgja lógini. Og teir nokta eisini at geva klaguvegleiðing. Tá eg spurdi um ein klagufaldara fekk eg at vita, at sovorit nýtti man ikki í Føroyum. So ein skuldi næstan trú, at teir fingu eyka bonus fyri at nokta fólki hjálp.

Eg skilji bara slett ikki, at teir kunna acceptera, at børn ganga í holutum skóm og tunnum jakkum og sova undir eini dýnu, uttan at so mikið sum at blunka. Eg spurdi deilarleiðaran á Almannastovuni, um hann ikki dugdi at síggja trupulleikan frá míni síðu av, og til hettar svaraði hann blankt nei. Og tað er kanska akkurát har trupulleikin liggur. Eg havi eisini heitt á barnaverndina at hjálpa, men teir siga tað er Almannastovan og kasta bóltin víðari.

Eisini søkti eg í auguist mánaði um hjálp til brilllur til elstu dóttrina, sum hevur +4 styrki á báðum eygum. Hettar er ikki viðgjørt enn, tí teir hava blakað báðar umsóknirnar burtur. Bæði mína og tað frá optikaranum.

*So mín spurningur er:*
Hvat tramin gongur fyri seg á Almannastovuni í Havn? Hvat sita teir har til, tá teir ikki gera peningsverk kortini?

Inntil eg einaferð blívi klókari upp á hetta, má eg ganga biddaragongd opinbart. Og tað er ein sera niðurverdigandi háttur at behandla tey sjúku í samfelagnum.

## Er svínakjøt mannaføði?

JÁKUP PETERSEN



**Um ein hevur etið svínakjøt og framleiðslu av hesum kjøti kann ikki útihýsast, at dioxin hevur verið í. Dioxin kann geva krabbamein, minka um møguleikan at fáa børn, geva húðsjúkur o.s.fr.**

Vit minnast øll gøluna í Kina, har børn í hópatali eru deyð av eitur í mjólk. Virkir í Europa íroknað danska ARLA høvdu í langa tíð selt barnamjolk við plastik í. Eftirlit? Ikki so nógv!

Seinasta er, at írskir bøndur hava latið svínakjøt á europeiska marknaðin innihaldandi Dioxin. Hetta er eitt sera vandamikið evni og kann føra til krabbamein, minkaði evni til at fáa børn o.s.fr.

Eftirlitið virkar soleiðis, at tað verða tiknar stikkroyndir. Tað vil siga, at partur av vøru saktans kann fara heilt upp á handilshillarnar full av eitri uttan, at vit vita av tí. Og tað er tað sum nú er hent.

Ikki nokk við tí. Vøra gjørd av grísakjøti so sum ymiskir rættir, pylsa, skinka, livurpastei o.s.fr. kann verða dálkaði av hesum eitri.

Nú jólini nærkast, og vit fara undir at seta lívið í vága fyri at eta dunnur og høsnarungar, sum saktans kunnu verða fullir í salmonella, so er eisini at hugsa um, at vit kunnu fáa stóran skaða av livurpastei, pylsu, skinku o.s.fr. Vit vita longu, at chips gevur krabbamein.

Var tað nakar, sum segði, at tað sum er á handilshillunum er væl kannað og vandaleyst?

## Føroyingar fremja ágang ímóti børnum...

SIGMUND ANDREASEN



Hetta sigur umhvørvismaðurin Paul Watson.

Man skuldi trúð, at Paul Watson bleiv klókari við árinum, men nei. Hann gongur stadigvekk við klaffun fyri eyguni. At jagstra føroyingar fyri at drepa grind liggur ovast á listanum, Paul Watson burdi vitað, at tað ikki er tí vit drepa grind, at læknar ávara ímóti at eta tvøst og spik, men grundina finna vit hjá landsmonnum Paul Watson og fleiri við sum gifta alla klótuna.

Mín vón hevði verið, at Paul Watson brúkti sínar kreftir at verja Jørðklótuna ímóti tí stóru dálking, sum fer fram og hevur gjørt tað í fleiri ár, tað er púra klárt at øll tann gift, sum rennur út á hav, og tað sum fer upp í luftina kemur at gera tað óliviligt her á jørð, bæði fyri menniskjur og djór.

**Sosialurin**

**Sosialurin**
Stovnaður: 1927
**Ábyrgdarblaðstjóri:** Jan Müller jan@sosialurin.fo
**Blaðstjóri:** Eirikur Lindenskov eirikur@sosialurin.fo
**Redaktiónsleiðari:** Kári Mikkelsen karim@sosialurin.fo

**Marknaðardeild:** lysing@sosialurin.fo
**Marknaðarleiðari:** Gudny Langgaard gudny@sosialurin.fo
Tróndur Skaalum trondur@sosialurin.fo
Høgni Thomsen hogni@sosialurin.fo
Elin Vatnhamar Olsen evo@sosialurin.fo

**Blaðfólk:**
Áki Bertholdsen aki@sosialurin.fo
Vilmund Jacobsen vilmund@sosialurin.fo
Snorri Brend snorri@sosialurin.fo
Magnus Gunnarsson maggi@sosialurin.fo
Rigmor Dam rigmor@sosialurin.fo
Leo Poulsen leo@sosialurin.fo
Eyðun Klakstein eydun@sosialurin.fo
Árni Joensen arni@sosialurin.fo
Anna V. Ellingsgaard anna@sosialurin.fo
Rógvi Nybo rogvi@sosialurin.fo
Eirikur í Jákupsstovu eij@sosialurin.fo
Bergur Johannesen bergur@sosialurin.fo

**Ítróttur:**
Jákup Mørk jakup@sosialurin.fo

**Myndamenn:**
Álvur Haraldsen alvur@sosialurin.fo
Jens Kristian Vang jensk@sosialurin.fo

**Kykmyndir:**
Harald í Kálvalíð harald@ras2.fo

**Sosialurin í Norðoyggjum:**
Nólsoyar Pálsgøta 1, 700 Klaksvík
tel. 458686 fax 458687
e-post: klaksvik@sosialurin.fo

**Sosialurin í Suðuroy:**
tel. 375364 fax 375464
tel. 228814
e-post: aki@sosialurin.fo
e-post: dagfinn@sosialurin.fo

**!!! Haldarar**
sum ikki hava fingið blaðið, kunnu ringja til 341818 frá kl. 8.00-20.00 og boða frá

**Uppseting/prent:**
Uppseting: Sosialurin
Prent: Prentmiðstøðin
**Útgevari:**
Sp/f Sosialurin
**Avgreiðsla:**
Mán.-frí. 8-16
Tórsgøta 1, 100 Tórshavn
Tel. 341800, Fax 341801
**Postadressa:**
Postboks 76, 110 Tórshavn
**E-mail:**
post@sosialurin.fo
lysing@sosialurin.fo
lysingartorg@sosialurin.fo
varp@sosialurin.fo

Blaðið verður prentað mánadag-fríggjadag klokkan 13[30]

**Lýsingar**

| Freistir: | Tekstlýsingar | Størri lýsingar | Lýsingartorgið | Heilsanir |
|---|---|---|---|---|
| Mánadagsblaðið | Mán.kl. 10 | Frí. kl. 15 | Frí. kl. 12 | Frí. kl. 12 |
| Týsdagsblaðið | Týs. kl. 10 | Mán. kl. 15 | Mán. kl. 12 | Mán. kl. 12 |
| Mikudagsblaðið | Mik. kl. 10 | Týs. kl. 15 | Týs. kl. 12 | Týs. kl. 12 |
| Hósdagsblaðið | Hós. kl. 10 | Mik. kl. 15 | Mik. kl. 12 | Mik. kl. 12 |
| Fríggjadagsblaðið | Frí. kl. 09 | Hós. kl. 15 | Hós. kl. 12 | Hós. kl. 12 |

Størri lýsingar, sum nógv arbeiði stendst av, mugu vera inni í góðari tíð og áðrenn ásettu freistir.
Framíhjápláss má umbiðjast í góðari tíð.

**Stødd:**
Ein heil síða í Sosialinum er 254 mm breið og 346 mm í hædd. Breiddin á einum teigi er 39 mm og rúmið millum teigarnar er 4 mm.

**Innsent tilfar**
Fult navn skal vera undir innsendum tilfari. Innsendar greinar, har blaðleiðslan ikki er kunnað um bústað og telefonnummar, verða ikki settar í blaðið.